Fiskimálaráðið
Fiskiveiðieftirlitið

Eygleiðarar á fiskiskipum fyri Fiskiveiðieftirlitið

4 størv sum eygleiðarar umborð á fiskiskipum, verða hervið lýst leys. Tvey av størvunum verða sett skjótast gjørligt. Tvey av størvunum verða sett umleið 1. august 2004.

Starvið fevnir m. a. um hesar uppgávur:
- Skráseta, skriva frágreiðing um fiskiskapin og staðfesta hvar fiskað verður
- Kanna og meta um veiðuna
- Skráseta útblaking, hjáveiðu og veiðu av undirmátsfiski
- Kanna fiskireiðskapin
- Kanna dagbókaføringina
- Kanna veiðu í hvørjum einstøkum háli
- Taka sýnir
- Fylgja við um fylgisveinaeindin er virkin og sambært ásetingunum
- Boða frá møguligum brotum á loyvistreytirnar
- Annað eftirlitsarbeiði

Førleikakrøv:
- Fiskivinnutøkningur, ella aðra viðkomandi útbúgving. Fyrimunur men ikki krav.
- Royndir innan ymiskar veiðihættir.
- Heilsuváttan fyri sjómenn.
- Góðan førleika at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli.
- Evnir at arbeiða sjálvstøðugt og óheft.

Setanartreytir:
Mánaðarlønin er kr. 24.013,05 svarandi til stig 35 í tænastumannalønartalvuni.
Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og deildir/stovnar undir tí.
Tænastustaðurin í løtuni er Fiskiveiðieftirlitið.
Starvsheiti er eygleiðari.

Tann ið sett/ur verður, má kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

Umsóknir:
Umsóknir saman við avriti av prógvum, og møguligum viðmælum, skulu vera Fiskiveiðieftirlitinum í hendi í seinasta lagi 21. juni 2004 kl. 15.00.

Umsóknirnar skulu sendast til :

Fiskiveiðieftirlitið
postsmoga 347
110 Tórshavn

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Fiskiveiðieftirlitið tlf. 35 30 30 og tosa við Símun Joensen, fulltrúa.

Avloysari fyri pedagog í farloyvi

Undir Heimarøktini og Serforsorgini, á Bústovninum Eirargarði 16A/BN er 1 pedagogstarv í farloyvi á 75% leyst at søkja frá 1. juli 2004, til og við 1. august 2005. Ella eftir nærri avtalu.

Á bústovninum búgva 15 menningartarnað fólk, har av fleiri hava likamlig brek.

Dentur verður lagdur á, at tann, sum sett/ur, er likamliga væl fyri, og er áhugað/ur at luttaka aktivt í øllum avbjóðingum, og er opin fyri nýhugsan. Neyðugt er at arbeiða sjálvstøðugt, og at samstarva við onnur, umframt at vera før/ur fyri at taka ábyrgd og avgerðir í arbeiðinum.

Arbeiðstíðirnar eru skiftandi, og roknast skal við morgun-, kvøld- og náttarvaktum.

Starvið er sáttmálasett, millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið lønarstig 11/18. Um ongin umsókn er frá pegagogi, verður hjálparfólk sett/ur í starvið.

Nærri fæst at vita um starvið frá leiðarunum á tlf. 315422/315423.
Umsóknarfreistin er 15.06.04 og skulu umsóknir við prógvi, viðmælum v.m. sendast til:

Bústovnurin Eirargarður 16A/BN
Eirargarður 14-16
FO-100 Tórshavn

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3793
Navn: Sp/f PK
Adressa: Marinargøta 2, 188 Hoyvík

Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 02.06.2004
Viðtøkudato: 02.06.2004
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: Kr. 80.000,00 í oðrum virðum til kurs 100.
Stovnari: Páll Kjærbo, Marinargøta 2, 188 Hoyvík.
Stjórn: Páll Kjærbo, Marinargøta 2, 188 Hoyvík.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum.
Grannskoðari: Sp/f Revisión v/ Kaj Joensen, Stoffalág 4, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12.
Fyrsta roknskaparár: 02.06.2004 - 31.12.2004
Endamál: Endamál felagsins er keyp og søla og annað virksemi í hesum sambandi.

Skráseting Føroya
tann 3. juni 2004
Kristin Balle

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin

Marknaðarfólk

STARV sosialurin

Ert tú fyrikomandi, dugir tú væl at selja, ert tú álítandi, røkin og dugur at arbeiða sjálvstøðugt, so ert tú júst tann persónurin, sum vit leita eftir.

Til marknaðardeild okkara søkja vit eftir starvsfólki, sum kann vera viðvirkandi til framhaldandi at menna inntøkugrundarlag okkara, og sum í ávísan mun eisini kann átaka sær leiðsluupp-gávur.

Lýsingarinntøkur eru ein týðandi partur av tilverugrundarlagnum hjá føroysku bløðunum, og tí leita vit støðugt eftir nýggjum hættum at menna hendan partin av fyritøkuni. Tí er tørvur á fólkum, sum duga at fáa og ikki minst arbeiða viðari við góðum hugskotum. Kundarøkt, account-management og telemarketing eru eisini arbeiðsuppgávur, sum vit framyvir koma at leggja enn størri dent á, og kemur starvið eisini partvíst at fevna um hesi øki.

Í samstarvi við starvsfelagarnar á marknaðardeildini verður tú eisini við í dagligu framleiðsluni av blaðnum. Herundir tilrættislegging av lýsingarátøkum, temabløðum og lýsingartilboðum.

Løn verður ásett sambært avtalu.

Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, so er bert at senda eina umsókn við frágreiðing um útbúgving og royndir til okkum. Ynskir tú at fáa meira at vita um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Jonhard Hammer, marknaðarleiðara, á tlf. 341800. Tað ber sjálvandi eisini til at senda teldupost á jonhard@sosialurin.fo

Umsóknarfreistin er 11. juni, og skal umsóknin saman við viðkomandi skjølum sendast til:

Sosialurin
Marknaðardeildin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blað. Umframt tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið. Á Sosialinum starvast í dag uml. 25 fólk.

BILSKROKK

Lakering & Plátuverkstaður
v/Brynleif Askildsen

PLÁTUSMIÐUR

Søkt verður eftir plátusmiði at byrja beinanvegin.

Umsøkjarin skal helst hava útbúgving innan plátusmíð, men kann ein við royndum innan økið eisini søkja.

Neyðugt er, at tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt og harvið dugir sjálvur at loysa møguligar trupulleikar, sum vilja stinga seg upp í sambandi við arbeiðið.

Áhugað verða biðin um at ringja og avtala eina tí til eina samrøðu

Slættanesgøta 9 · Boks 2227
Tel 32 24 71 ella 21 24 71 · Fax 31 20 71
FO-110 Tórshavn

Til Frítíðarskúlan søkist

1 pedagogur at arbeiða 30 tímar um vikuna, at byrja 9. august 2004.

1 hjálparfólk at arbeiða 20 tímar um vikuna, at byrja 9. august 2004.

Um eingin pedagogur søkir, verður hjálparfólk fyribils sett í eitt ár.

Lønin er sambært sáttmála hjá Føroya Pedagogfelag.

Umsóknirnar skulu vera Skála Kommunu í hendi í seinasta lagi 21. juni 2004.
Viðmerkjast: dagrøktarleiðarin.

Eru spurningar til størvini, ring til leiðaran i dagrøktini tlf. nr. 586004.

Skála Kommuna
Valnevndin

Arbeiðshandskar
til oll endamál - bæði á sjógvi og landi
Beinleiðis frá framleiðara
Landsins størsta úrval
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar
ADC-Heilsølan spf
Lágvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo
Sosialurin 311800

TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

Lærari til maskindeildina

Starvið er eitt fulltíðarstarv.

Umsøkjarin skal hava sveinabræv sum maskinsmiðjur og minst 2 ára starvsroynd innan yrkið.

Umsøkjarar við framhaldandi útbúgving og undirvísingarroyndum hava fyrimun. Eisini er áhuga fyri støddd-, alis- og evnafrøði, CAD/CAM, CNC og nýtslu av EDV, ein myrimunur.

Á maskindeildini starvast 7 lærarar í føstum starvi, umframt tímalærarar og 1 verkstaðarhjálpari. Á deildini er tað dagliga næmingatalið umleið 60 sum eru: Lærlingar, Slt- og Atstøðisnæmingar.

Setanarkor til fast starv:
Fyrstu 2 árini verða roknað sum royndartíð, har tann, sum verður settur í fast starv, má verða til reiðar at taka ta eftirútbúgving, tað verður seg pedagogiska/undirvísingarliga ella aðra førleikagevandi útbúgving, sum er neyðug fyri at verða settur í fast starv.

Løn:
Lønin verður sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og FTL.

Starvið er sett at byrja 9. august 2004.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um útbúgving, viðmælum og starvstíð skal vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 17. juni 2004.

Meira fæst at vita um starvið, við at venda sær til Helga Mortensen, leiðandi lærara á maskindeildini á tlf. 515872.

TEKNISKI SKÚLIN Í TÓRSHAVN
Marknagilsvegur 75 · Postsmoga 239
FO-110 Tórshavn
Telefon +298 311957 · Telefaks +298 316621
e-mail: tst@tst.fo
Heimasíða: www.tst.fo

Kappríðing á Leynavatni

Kappríðingin verður
leygardagin 12. juni kl. 15.00

Tilmelding seinast týsdagin 8. juni til nevndina.
Ring: 314500 & 320130 & 251789

Sosialurin 311800

FØROYA RÍÐINGARFELAG

Hjálparfólk
til frítíðarskúlan Smílibýlið í Stoffalág 82

Størvini:
Eru eitt hjálparstarv uppá 25 t. og eitt fyri hjálparfólk í barnsburðarfarloyvi uppá 25. t.

Stovnslýsing:
Á Frítíðarskúlanum Smílibýlinum ganga 64 børn. 42 ganga fyrrapart og 22 ganga seinrapart.

Tað er týdningarmikið:
At tit hava hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag við virðing, áliti og umsorgan fyri tí einstaka barninum, og eitt gott samstarv millum foreldur og starvsfólk.
Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin kann arbeiða sjálvstøðugt, er røkin og førur fyri at taka avgerðir í arbeiðinum.

Vit leggja stóran dent á:
At vit eru eitt frítíðartilboð til børnini. Vit eru saman við børnunum í teirra frítíð.
Vit vilja skapa møguleika fyri, at børnini mennast við at lurta, práta og og vera saman við teimum.

Setanarviðurskifti:
Størvini verða sett tann 09. august 2004, løn sambært sáttmála millum Føroya Kommunala Arbeiðsgerarafelag og Føroya Pedagogfelag.

Umsókn:
Saman við viðmælum, upplýsing um útbúgving og royndum skulu vera frítíðarskúlanum í hendi í seinast 14. juni 2004.

Umsóknir skulu sendast til:
Frítíðarskúlan Smílibýlið, Stoffalág 82, 100 Tórshavn.
Setanarsamrøður verða skjótast gjørligt eftir hetta.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til:
Barbaru Dahl, leiðara og
Bjørg Danielsen, varðaleiðara á Tlf. 314879

Hús til sølu

Helvt av tvíhúsum við stórari garagu til sølu.

Tlf. 314245